**Barna- og útbúgvingarmálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | Skrivið her |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**projektering av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetri Føroya fram til útboð**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at halda útreiðslur til projektering av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetri Føroya fram til útboð.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 31 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2028.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Deildirnar hjá Fróðskaparsetrinum eru í dag spjaddar í Havnini, og eingi felagshølir eru til at savna alt Fróðskaparsetrið. Nýggi felagsbygningurin til kampus hjá Fróðskaparsetrinum er kjarnin í eini yvirskipaðari heildarætlan frá 2018, at savna alt virksemi hjá Fróðskaparsetrinum í ein samanhangandi lestrar- og granskingarbýling, sum fevnir um økið á Frælsinum, Nóatúni og Debesartrøð.

Felagsbygningurin skal vera dukandi hjartað á Fróðskaparsetrinum og ein vitanarviti í Norðurhøvum. Felagsbygningurin skal fyrst og fremst vera eitt livandi lestrarumhvørvi við lesisali, bólkarúmum og krókum, har høvi er at hugsavna seg. Har skal vera ein góð felags móttøka og bókasavnstænasta til lesandi og onnur við ørindum á Fróðskaparsetrinum. Í felagsbygninginum skulu vera fjølbroytt undirvísingarhøli, sum deildirnar á Fróðskaparsetrinum kunnu nýta eftir tørvi. Har skulu vera liðiligar samkomuhallir, sum kunnu hýsa felagstiltøkum, prógvhandanum og størri altjóða ráðstevnum.

Felagsbygningurin skal eisini vera skrivstovubygningur hjá meginfyrisitingini á Fróðskaparsetrinum og hýsa rektara, felagsfunktiónum og fundarhølum. Í felagsbygninginum skal vera møguligt at fáa okkurt til matna, og felagsbygningurin skal í mest møguligan mun vera opin fyri almenninginum. Tað er ein fyritreyt fyri menning av hægri útbúgvingum og gransking, at akademiska vitanin verður savnað á einum kampusøki við tí endamáli at samansjóða, skapa trivnað og at gagnnýta synergieffektir, herundir brúka felagshøli, útbúnað, undirvísarar o.a.

Seinastu árini hevur Fróðskaparsetrið verið í einari tilgongd at menna allar útbúgvingarnar eftir Bolognaleistinum, sum er ein felags leistur, flestu hægri lærustovnar í Evropa eru skipaðir eftir. Hetta fer at styrkja flytføri hjá lesandi á Fróðskaparsetrinum, og gera tað lættari at vitja aðrar hægri lærustovnar sum skiftislesandi, og at prógv frá Fróðskaparsetrinum fáa altjóða viðurkenning.

Umráðandi fyri at fáa góðkenning er, at Fróðskaparsetrið hevur góðar skipanir at stuðla teimum lesandi í at fullføra lesnaðin. Hetta krevur m.a., at hølini skulu kunna nýtast av rørslu-, hoyri- og sjónbrekaðum. Lesandi mugu hava lætta atgongd til stuðulstænastur, so sum at fáa leiðbeining frá Studna og Vegleiðingarstovuni. Kampus má vera eitt stað, har tey lesandi trívast, og felagsbygningurin er fyrsta stigið á hesari ferð.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóggáva er viðvíkjandi projektering av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetrinum.

Arbeiðið við at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum er í gongd. Bygningarnir skulu nýtast sum partur av kampus hjá Fróðskaparsetrinum. Galdandi løgtingslóg er løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at nýta upp til 31 mió. kr. til projektering fram til útboð av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetrinum. Fasurnar í projekteringini eru hesar: skipanaruppskot, prosjektuppskot, forprosjekt, høvuðsprosjekt, uppfylging (undir bygging) og fakeftirlit (undir bygging). Uppfylging og fakeftirlit er ikki partur av hesari løgtingslóg, men vera við í komandi løgtingslóg fyri sjálva byggingina.

Byggingin kann ikki byrja fyrrenn ein samtykt løgtingslóg fyriliggur, ið heimilar landsstýrismanninum at seta gongd á byggingina. Ætlanin er tá fyrst at bjóða út byggibúning og byggiplássið og síðani sjálva byggingina. Ynskiligt er, at byggibúning verður gjørt stundisliga áðrenn útboð av bygginini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið er annar liður í at fyrireika byggingina av nýggja felagsbygninginum til kampus hjá Fróðskaparsetrinum. Talan er um projekteringina av felagsbygninginum, ið landsstýrismaðurin fær heimild til at skipa fyri. Fyrsti liður í fyrireikingini var arkitektakappingin, ið var hildin fyrr í ár. Vinnarin av kappingini varð kunngjørdur í juni 2023.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið og Landsverk.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá .......

Hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Projekteringin av nýggja felagsbygninginum til kampus hjá Fróðskaparsetrinum kostar sambært Landsverk í mesta lagi 31 mió. kr. Projekteringin fevnir um projekteringsfasurnar: skipanaruppskot, prosjektuppskot, forprosjekt, høvuðsprosjekt. Kostnaðurin fevnir eisini um verkætlanarleiðslu og innanhýsis ráðgeving, onnur ráðgeving, forkanningar, indeksreguleringar og pening til at bjóða verkætlanina út.

Frá 2022 til 2023 eru brúktar 4,5 mió. kr. til arkitektakappingina av nýggja felagsbygninginum. Arkitektakappingin bygdi víðari á heildarætlanina, sum bleiv liðug í 2018. Vinnarin av arkitektakappingini, sum var avgjørd í juni 2023, vann rættin at projektera felagsbygningin til kampus, sum høvuðsráðgevi.

Til projekteringina skulu játtast 31 mió. kr., ið fella soleiðis yvir ár: 9 mió. kr. í 2024, harav 3 mió. kr. eru játtaðar í fíggjarlógini fyri 2023, og 22 mió. kr. í 2025. Annars verður projekteringin framd sambært játtanum veittum í fíggjarlógini.

Ætlandi skal projekteringin verða liðug í 2025, og byggingin kunna fara í gongd í 2026.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at lógaruppskotið ber í sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur jaliga ávirkan á vinnuna vegna økt ráðgevingar- og byggivirksemi, tá ið verkætlanin fer í gongd.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Felagsbygningurin til kampus hjá Fróðskaparsetrinum verður bygdur samsvarandi galdandi regluverki innan bygging, og fer hesin bygningurin í størri mun enn fyrr at halda seg til burðardygd í bygging. T.d. var ein týðandi partur av dømingini av innkomnu arkitektauppskotunum burðardygd, og vinnandi uppskotið stóð seg væl á hesum økinum. Eftir teirra LCA-metingum[1] verður tað bygt við 11 kg./C02/m$^2$, sum er undir galdandi mark fyri bygningar omanfyri 1.000 m$^2$, sum í danskari lóggávu er 12 kg./C02/m$^2$. LCA og LCC[2] frágreiðingar verða leypandi partar av verkætlanini.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Verkætlanin fer at hava eina jaliga ávirkan á virksemið á staðnum, bæði í byggitíðarskeiðnum og ikki minst, tá verkætlanin verður liðug. Lógaruppskotið fer tó eisini at hava jaliga ávirkan á Føroyar sum heild, tí lógaruppskotið er við til at betra um karmarnar hjá Fróðskaparsetrinum,

[1]LCA (Life Cycle Analysis), er ein greining av umhvørvisávirkanina í lívsringrásini hjá bygninginum (50 ár)
[2]LCC (Life Cycle Cost), er ein greining av tí fíggjarligu virkisførinum í lívsringrásini hjá bygninginum (50 ár)

ið er okkara universitet, hvørt aðalmálið er burðardygg menning av føroyska samfelagnum, har gransking og undirvísing eru kjarnin í virkseminum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Tá ið felagsbygningurin til kampus hjá Fróðskaparsetrinum er bygdur og tikin í nýtslu, fær tað jaligar avleiðingar fyri lesandi og starvsfólk á Fróðskaparsetrinum, tí fysisku karmarnir kring Fróðskaparsetrið verða munandi betri.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ongar kendar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp til 31 mió. kr. til projektering av felagsbygninginum til kampus til Fróðskaparsetrið. Tað er Landsverk, sum fær verkætlanina og játtanina at umsita sum byggiharri, vegna landsstýrismannin.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Ja | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Í stk. 1 verður heimild givin landsstýrismanninum at halda útreiðslur til projektering av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetrinum fram til útboð. Verkætlanin er ein liður í ætlanini at savna alt virksemið hjá Fróðskaparsetrinum í ein samanhangandi lestrar- og granskingarbýling, sum fevnir um økið á Frælsinum, Nóatúni og Debesartrøð.

Ásett er í stk. 2, at útreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 31 mió. kr. Umframt sjálva projekteringina fevna útreiðslurnar eisini um verkætlanarleiðslu og innanhýsis ráðgeving, onnur ráðgeving, forkanningar, indeksreguleringar og pening til at bjóða verkætlanina út.

**Til § 2**
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Løgtingslógin fer úr gildi 1. januar 2028, tá ið samtykta játtanarskeiðið er av, og projekteringin væntandi er liðugt.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 12. desember 2023

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal X: